# Jólakonsertir í Klaksvík og Fuglafirði



*Fullsett var í Fuglafjarðar kirkju*



*Nýggja Badmintonhøllin í Klaksvík stóð royndina við jóla- og sangløtuna í gjár*



*Árliga jólakonsertin hjá Klaksvíkar Hornorkestri var ikki so væl vitjað hesaferð*

JÓLAKONSERTIR

*Snorri Brend*
*Myndir: Dávur Winther*

Hetta vikuskiftið vóru fleiri jólakonsertir í Klaksvík og í Fuglafirði.

Sunnudagin var ein konsert í Fuglafjarðar kirkju, sum Fuglafjarðar Sangkór við Frits Johannesen skipaði fyri. Líkt er til at fólki dámar hesar konsertirnar, tí kirkjan var stúgvandi full.

Klokkan 18 var Badmintonhøllin í Klaksvík nærum fullsett, tá skipað varð fyri eini sang- og hugnaløtu, har millum annað Vitin, Kvartettin í Bestesda og sangkórið í Betesda sungu og spældi.

Hjá teimum, sum framvegis høvdu hug at hoyra jólatónar, var enn eitt høvið til hetta kl. 20, tá Christianskirkjan var karmur um árligu jólakonsertina hjá Klaksvíkar Hornorkestur.

Við til konsertina var nýggja verkið "Jólaverkið 2007" hjá Jóhan Mortensen, har blandað kór og orkestur sang og spældi. Fólk lótu væl at tónleikarunum, men hildu samstundis, at verkið ikki heilt livdi upp til vónirnar.

Sagt verður eisini, at kirkjan ikki var so fullsett sum vanligt er.